tíðindablaðið sosialurin
Telefon 1 18 20
Argjavegur 26, 3800 Argir
Postsmoga 76, 3800 Tórshavn

Útgevari: P/f Sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Blaðfólk: Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Tórfinn Smith
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Óvissa

TAÐ er ikki einans tann politiska støðan í landinum, sum er óviss í hesum døgum. Eisini støðan hjá svartkjaftaflota okkara er ógreið í løtuni. Páskahátíðin og meira afturat man vera farið aftur um bak, áðrenn vit við vissu kunnu siga nakað ítøkiligt um framtíðarútlitið hjá í hvussu er tveimum av teimum stóru og nýggju svartkjaftatrolarunum.

NEYVAN er nøkur orsøk til at endurgeva alla svartkjaftasøgu okkara her, tí hana hava vit hoyrt og lisið um til tað óendaliga. Men nú aftaná umleið 10 ár í hesi vinnu, ber enn ikki til at siga, um verulig framtíð er í svartkjaftinum. Stóru íløgurnar í verksmiðjutrolarar, sum ikki kunnu forrenta seg, eru um at taka vónirnar frá monnum. Svikaligur fiskiskapur, byrjunnartrupulleikar og so ein svikafullur marknaður hava nærum køvt tað bjartskygni, sum annars var drívmegin hjá monnum, sum fyri ikki so langari tíð síðani settu sítt álit til hesa nýggju vinnu.

TAÐ er einki at taka seg aftur í, at teir báðir nýggju svartkjaftatrolararnir Andrias í Hvannasundi og Polarfarið hava havt torføra byrjan. So illa hevur gingist, at landið hevur verið noytt til at leggja nógvar milliónir av krónum út til royndir at fáa meira burtur úr framleiðsluni. Hesar royndir eru um at vera lidnar og skal tað sigast, at úrslitið sum heild er gott. Umframt at kunna framleiða fars og butterflyfløk, hava teknikarar okkara nú eisini gjørt tað møguligt hjá skipunum at framleiða skræðuleyst

oddagrein

flak. Men so koma vit aftur til tann afturvendandi spurningin: hvør skal keypa og hvussu nóg vilja teir gjalda!!!

NÚ kann ein sjálvandi vera eftirklókur og siga, at tað var skeivt at gera íløgur í hesi skip, uttan at vera vísur í, um nakar vildi keypa vøruna. Soleiðis eiga vit tó ikki at hugsa. Tað hevur vissuliga ikki skortað vilji, dirvi og áræði at fara undir at troyta hetta stóra tilfeingi og hava eisini okkara politikarar sett sítt álit á, at hesar royndirnar fóru at eydnast. Tað má sigast nú, at tær eru um at eydnast, men enn restar so í at fáa síðsta liðið at virka, nevniliga søluna av hesi vøru. Tað kann sigast fyri og ímóti um okkara sølufólk hava verið sína uppgávu vaksin. Tað er tó ein sannroynd, at tað tekur tíð at innarbeiða eina nýggja vøru sum hesa.

SPURNINGURIN er so nú, um vit skulu halda fram við at fiska svartkjaft og framleiða hann til matna umborð uttan at vera vís í, um vit fáa nóg nógv fyri vøruna. Hetta eru spurningar, sum m.a. landsstýrið skal taka støðu til áðrenn 10. mai, tá pengarnir, sum tað almenna hevur játtað til svartkjaftaroyndirnar, eru uppi. Tað verður í hvussu so er áhugavert at frætta aftur frá teimum, sum standa fyri skipunum og frá teimum serkønu, sum landið hevur sett at taka sær av roynd-num umborð á svartkjaftaskipunum. Vónandi spyrst okkurt gott burtur úr í síðsta enda.

jamü

tjak og meiningar

Hættislig altjóða kabarettsýning

Frægastu sjónleikarar munnu vera teir, ið spæla so væl, at teir verða tiknir heilt í fullum álvara. Tí er sjónleikarakynstrið eitt av teim evnum, sum mugu vera tilstaðar hjá einum fullkomnum, demagogiskum tingpolitikara, sum kann spæla so væl, at hann fær fólkið við sær.

Óli Breckmann, t.d. byrjaði sína karrieru sum sjónleikari, nevniliga á studentakabarettunum miðskeiðis í 60'unum. Millum annað setti *sosialistablaðið »Framin«* tá so góðar framtíðarvónir til henda leikara, at teir skrivaðu í 1968 (citat):

»Skal nakar takast fram um hinar, skal tað vera Óli Breckmann, sum sýndi sjáldsamar leikaragávur, nógv meira enn tað, ið kabarettin sum amatørleikur krevur. Bert ein einstakur av hasari støddini kann bjarga einari heilari framførslu ...« (citat endað)

Nú — 20 ár eru liðin, og spádómur »Framans« hevur borið ávøkstur. Sjónleikaragávur Ó.B.'s komu at røkka nógv longur enn til Sjónleikarahúsið og studentakabarettina. Í dag líka til múgvað borðhald í annars fátæksliga hersetta Namibia — og kossum frá svørtum børnum. Hvørjum endar tað við? Leggur hesin sjónleikari allan heimin undir seg at enda?

Seinni, í Onglandi, gjørdist maðurin heitur tjóðveldismaður og skrivaði fast í Íslendsk dagbløð um føroyskan politikk og danska kúgan. Í dag spælir hann kabarett á røðarapalli danska tingsins. Sum danskur, og ikki føroyskur politikari.

Tó taka ikki nógvir danskir tingmann leik hansara líka mikið fyri fult og »Framin« gjørdi fyri 20 árum síðani.

Men, fyri at fara frá skemti til álvara: nú er maðurin ikki stuttligur longur, eins og tá hann spældi Hannu Lisberg á sinni á palli Sjónleikarahúsins. Nú verður leikur hansara tikin í álvara, kanska av øllum øðrum enn honum sjálvum, ja, kanska honum sjálvum við.

Namibia-flippið er sjálvandi valagn, tað áttu øll at gjøgnumskoðað. Um løgmaður og landsstýri yvirhøvur ikki skulu gera seg sjálvan til reint gjøldur, og góðtaka at Føroyar í heimsins eygum standa sum stuðlar fyri quislingastjórnir hjá rasistum í Suðurafrika, sum Sameindu Tjóðirnar boykotta, so er tað sjálvsagt, at Føroya landsstýri ræður yvir hvørjum tjóðum vit samarbeiða við, og ikki nakrir peningahávar og ein internationalur komikari. Annars hevur tað yvirhøvur onga meining at hava eitt landsstýri.

Sjálvandi er logikkurin hjá Dagblaðnum í lagi, tá teir sammeta orð løgmanns um at »demokratisera« onnur lond við at gera fiskivinnusáttmálar við tey, við Namibia-leikin. Sjálvandi broyta vit ikki eitt tandur í Sovjetsamveldinum við at fiska við Svalbard ella lata nakrar trolarar koma uppá beding her. Tað er uppgávan hjá sovjettiska folkinum at broyta teirra samfelag. Vit, sum ikki eru fleiri enn ein provinsbýur hjá teim, gera tað ikki.

So har er tað Atli Dam, sum er ein nógv tosandi maður, sum sjálvandi hevur »skitið í kálið«. Nú kann Breckmann brúka hatta móti honum. Men — men.

Hendur tað ringasta, sum henda kann, at fólkaflokkurin kemur í landsins stýri eftir valið í heyst, og tað litla Føroyar fer at gerast heimsgitið fyri at stuðla rasistiskum og fasistiskum stjórnum kring allan heim, har sjónleikarin kann sita við búgvin døgurðaborð og bedára heimin við sínum nekarakossum, so koma allir føroyingar at gjalda fyri henda orðrók. Ikki minst úti siglandi ella búgvandi landsmenn.

Meðan onnur Norðurlond, eitt nú Danmark, gjøgnum m.a. »Danida« hava roynt at hjálpt tilafturskomnum afrikanskum londum sum Mosambique, hava suðurafrikanskar innrásardeildir smildrað tað sum henda hjálp hevur bygt upp. Tí hevur onkur danskur tingmaður nú mælt til at danir senda hermenn at verja hesi virki og hjálpartiltøk, sum danir gjalda. Tað er sjálvandi heilt burtur úr vón og viti, tí hvat nyttar ein danskur hermaður í afrikanskari frumskóg móti vælvandum suðurafrikanskum heri? Men perspektivið er har: stuðla føroyingar tað fasistaland í Afrika, sum niðurbrýtur og knúsar tað, sum skandinavar royna at byggja upp fyri at hjálpa niðurundirkomnu grannalondum Suðurafrika?

Tað er tvætl, at siga, at hesi niðurundirkomnu, hungursraktu lond eru so, tí tey eru »kommunistisk«. Har ræður um breyð í munnin og ikki um »kommunismu« ella »kapitalismu«. Tað hevði verið líka mikið, hvat stýrini kallaðu seg, londini eru als ikki komin á tað stig, har talan kann vera um veruliga politiska ideologi. Tað er ein spurningur um at yvirliva. Tað royna m.a. Norðurlondini at hjálpa teimum við. Meðan føroyskir sjónleikarar eru við at stuðla teirra figgindum og eyðrænarum.

Nú tími eg ikki at skriva meir um hetta, vóni bert, at fólkið gjøgnumskoðar kabarett Óla Breckmanns, og ikki seinast at løgmaður, Atli Dam, og landsstýrið í hesum máli sum øðrum kenna sína altjóða ábyrgd, og banna hesum. Tí annars gerast vit aldri »sjálvstøðug tjóð« við altjóða virðing!

Bjargamaður.

HONDA
lak&rust
garanti
-findes ikke bedre